**Áheitan til persónar og fyritøkur, sum sambært hvítvaskløgtingslógini, skulu skrásetast hjá Skráseting Føroya.**

Við hesum verður kunnað um, at niðanfyristandandi persónar og fyritøkur skulu skrásetast hjá Skráseting Føroya:

- persónar og fyritøkur, sum vinnuliga útinna virksemi viðvíkjandi gjaldoyraveksling (gjaldoyravekslarafyritøkur)
- persónar og fyritøkur, sum vinnuliga útinna virksemi viðvíkjandi flutningi av peningi og virði (peningaflutningsfyritøkur), og
- útbjóðarar av tænastuveitingum til fyritøkur

Skráseting er treyt fyri, at nevndu persónar og fyritøkur kunnu útinna teirra virksemi.

**Fráboðan og nærri upplýsingar**

Til ber at venda sær til Skráseting Føroya fyri at fáa nærri upplýsingar.

Fráboðanarskjal og vegleiðing um skráseting í skránni v.m., eru annars at finna á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya, www.skraseting.fo.

**Fráboðanir skulu sendast til:**

Skráseting Føroya
Sigmundargøta 13
Postrúm 264
110 Tórshavn